# Trý ymisk lív – sam

**John Sigurd er 18 ár. Hann var fyri ferðsluóhappi tann 6. februar og fekk skallabrot. Hans Asbjørn er 20 ár. 19. oktober í fjør rendi hann frontalt inn í ein annan bil, breyt báðar hælirnar, høgra øklaknút og vinstra lær. Jens Erik er 43 og farna vikuskiftið koppaði hann út av vegnum í bili sínum. Jens Erik slongdist út, armurin lá undir og er nú lamin. Vit hava hitt teir tríggjar, sum allir kenna seg ógvuliga hepnar**

## Samrøða



**Rólant Waag Dam**
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo

Tað eru meiri enn fýra mánaðir síðani 20 ára gamli Hans Asbjørn Eysturdal av Skála var í einum ferðsluóhappi. Framvegis vitjar hann javnan á Landssjúkrahúsinum, har hann venur beinini, soleiðis at hann kann koma fyri seg aftur, eftir at báðir hælirnir, høgri øklaknútur og vinstra lær brotnaðu, tá hann rendi frontalt inn í ein annan bil tann 19. oktober í fjør.

Tað eru næstan fýra vikur síðani, at 18 ára gamli John Sigurd Danielsen av Strondum var fyri ferðsluóhappi, tá hann sat í einum bili, har førarin misti tamarhaldi og bilurin bóltaði runt. John Sigurd fekk skallabrot, varð sendur til Danmarkar og lá tveir dagar uttan vit. Í dag, fríggjadagin, verður hann útskrivaður av Landssjúkrahúsinum.

Sunnunáttina farna vikuskiftið koppaði 38 ára gamli Jens Erik Zachariassen úr Sørvági oman av vegnum í bili sínum. Hann varð slongdur út og høgri armur hansara kom at liggja undir bilinum, og er nú lamin. Jens Erik varð útskrivaður av Landssjúkrahúsinum í gjár.

### 18 ár og ongan luktisans

– Vit høvdu verið í Leirvík og bowlað, tveir vinmenn og eg. Tað er tað seinasta eg minnist áðrenn vit rendu á. Tað næsta eg veit til mín er, at eg vakni í Danmark tveir dagar seinni, sigur John Sigurd Danielsen.

Hann fær tískil ikki greitt frá, hvussu hann upplivdi ferðsluóhappi, sum hendi beint við kirkjuna á Strondum. Tað, John Sigurd veit um ferðsluóhappið, hann var fyri, hava onnur fortalt honum.

– Tað er øgiliga merkiligt, heldur John Sigurd, tá eg spyrji hann, hvussu tað er at vita, at tveir dagar eru farnir burtur úr minni hansara, har ein rúgva er hent, uttan hann hevur vitað av tí.

Førarin, sum koyrdi bilin, John Sigurd var í, misti tamarhaldið á bilinum, sum slongdist til síðuna, rendi inn í eina trappu og bóltaði runt.

John Sigurd breyt pannuna og nakkin sprekkaði. Spongin í høgra fremstafingri slitnaði, hann hevur mist luktisansin og kann bara hyggja við øðrum eyganum í senn, tí annars sær hann dupult. Kortini kennir hann seg hepnan.

Tí John Sigurd er fullgreiður um, at hann eins væl kundi latið lív í ferðsluóhappinum.

– Eg havi verið rættiliga heppin, sigur hann hugsanarsamur.

– Eg kundi eisini eins væl mist allar sansirnar, og í so máta havi eg eisini verið rættiliga heppin, sjálvt um eg ongantíð kann lukta aftur, sigur John Sigurd.

Hann varð sendur til Danmarkar og lá tveir dagar í



Sosialurin

respirator. Í 17 dagar var hann á flatlondum, áðrenn hann varð sendur heim til Føroya farna fríggjadag. Síðani hevur hann ligið á Landssjúkrahúsinum, men gongst sum ætlað verður hann útskrivaður í dag, fríggjadagin.

– Eg havi tað rættiliga gott nú. Í Danmark hevði eg høvuðpínu hvønn dag, men tað eri sloppin av við, greiðir